umhvørvisstovan

HÚSAR KOMMUNA

796 HÚSAR
FØROYAR

Argir hin 24. mars 2011
Málsnr.: 11/00012-8
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Hansen

**Viðvíkjandi: spillivantsætlanin hjá Húsar kommunu er góðkend**

Við hesum skal verða boðað frá, at Umhvørvisstovan hin 24.03.2011, sambært § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn, hevur góðkent spillivatnsætlanina hjá Húsar kommunu fyri tíðarskeiðið 2011-2015.

Umhvørvisstovan fekk hin 30.12.2010 spillivatnsætlanina til góðkenningar (mál nr. 10/00012-1). Ætlanin er gjørd av P/F Sofus M. Jakobsen, ráðgevandi verkfrøðingum og Sámal Johannesen saman við Húsar kommunu. Í sambandi við viðgerðina av ætlanini, hevur Umhvørvisstovan verið í samband við P/F Sofus M. Jakobsen, og 25.02.2011 varð dagførd ætlan send Umhvørvisstovuni til góðkenningar (mál nr. 10/00012-5).

Eisini framgongur tað í spillivatnsætlanini, at bygdaráðið á fundi hin 29.12.2010 hevur samtykt ætlanina.

Út frá eini heildarmeting av upplýsingunum í ætlanini, ið varð send 25.02.2011, verður mett, at komandi spillivatnsskipan í kommununi lýkur ásetingarnar í §§ 8-13 í kunngerðini um spillivatn. Hetta merkir, at spillivatnsætlanin m.a. fevnir um spillivatn frá øllum húsarhaldum, virkjum og virksemi í kommununi, og at spillivatnið eftir reinsing verður leitt gjøgnum lokaða skipan beinleiðis á sjógv við góðum vatnskifti.

Góðkenningin umfatar einans krøv ásett í spillivatnskunngerðini, t.v.s. tann umhvørivsliga partin av spillivatnætlanini. Góðkenningin tekur ikki støðu til hvørjar tekniskar loysnir eru valdar og um teknisku viðurskiftini sum heild eru í lagi, so sum dimensioneringin o.s.fr. Hetta er ábyrgdin hjá kommununi.

umhvørvisstovan Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo

Um tað seinni vísir seg, at spillivatnsskipanin elvir til dálking, t.d. uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skal kommunan, sambært § 10 stk. 3 í kunngerðini um spillivatn, fremja bøtandi atgerðir, so sum økta reinsing ella føra spillivatnið longur út.

Vinaliga

Jóhanna Olsen, deildarleiðari

/

Heidi Hansen, umhvørvisviðgeri

Avrit: Sofus M. Jakobsen, J. H. Scrøtersgøta 11, 100 Tórshavn